# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Vit hava ikki fingið ta byrjan upp á várið, sum vit høvdu vónað. Men tað hava verið aðrar løtur, har tey hevði givið meiri meining at koyrt venjaran enn júst nú*

*Ulrik Balling*

# Fimm sóu reytt



*Jósup Henriksen hevur skift frá frá KÍ til B68 í ár, og skoraði í sínum fyrsta dysti fyri toftamenn*

*Mynd: www.b68.fo*

**Í Leirvík var dómarin fjúrtan ferðir í lummanum eftir kortinum, men spælararnir halda ikki, at talan var um serliga illavorna uppgerð**

1. DEILD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fyrsta umfari í næstbestu deildini vóru úrslitini soleiðis, sum tað kundi roknast við frammanundan. Einasta undantakið var kanska í Leirvík. Har vitjaði TB, sum í tveimum teimum fyrstu umførunum í steypakappingini hevur staðið seg væl á heimavølli.

Tað var ógvuliga merkisvert, at dómarin ikki færri enn fjúrtan ferðir hevði gula kortið á lofti í Leirvík. Tríggjar ferðir bar hetta útvísingar við sær. Merkisvert var tað eisini, at øll trý málini vóru skorað beinleiðis upp á fríspark.

Á Svangaskarði vitjaði FSV04. Talan var ikki um serliga stóra fótbóltsupplivng. Men báðir partar vístu rætta hugburðin og stríddust. Pólverski álopsspælarin hjá FSV04, Andrjey, legði gestirnar framum, tá ið ein hálvur tími var farin. Hann varð feldur í B68 brotsteiginum og umsetti sjálvur til mál úr ellivu metrum.

Í B68 álopinum vóru Jósup Henriksen og Dánial Hansen, sum báðir eru komnir til felagið í vetur. Jósup javnaði til 1-1 dygst undan steðginum, eftir at FSV04 málverjin, Djóni Joensen, var farin eitt sindur skeivur í sínari meting av støðuni.

Sigursmálið skoraði Dánial Hansen, tá ið hann við høvdinum stýrdi bóltin í málið, eftir at bólturin varð lagdur innfyri úr vinstru. Síðstu løtuna royndi FSV04 at leggja trýst á, men heimaliðið helt tørn.

Í Fuglafirði legði ÍF bragdliga fyri. HB møtti við blaðungum liði. Vagnur Mohr Mortensen, sum orsaka av skaða ikki hevur spælt við besta liðnum, var elsti maður. Nógv tann størri parturin av HB spælarunum var undir 20 ár.

Nenad Saric setti hol á fyri ÍF, tá ið hann í vinstru sneiddi framvið fleiri, áðrenn hann skoraði. Atli Petersen økti um munin eftir innlegg úr høgru.

Bartal Eliasen var í ÍF álopinum. Tá ið tað restaðu tjúgu minuttir sendi hann bóltin í HB málið eftir innlegg úr høgru. Jan Ellingsgaard økti til 4-0 í 77. minutti. Hetta var fyrsta ferðin, at hann var á besta liðnum hjá ÍF, og tá ið hann skoraði, var tað fyrsta ferðin, at hann nært bóltin, eftir at hann var skiftur inn! Eftir innlegg úr høgru hálvbjargaði HB málverjin, Birgir Poulsen, tvær ferðir, áðrenn ungi maðurin setti bóltin í málið.

Sjey minuttir undan leikloki umsetti Bárður Mittelstein brotsspark til mál og harvið 4-1 til ÍF.

Klaksvíkingar vóru í Sørvági við blaðungum liði. Gestirnir spældu væl úti á vøllinum, men tað var lítil tyngd og broddur í álopinum. SÍ skoraði tvær ferðir í 1. hálvleiki, og so vóru øll stigini eftir í Sørvági. Fyrra málið gjørdi Jørgin Meitilberg, sum er komin til felagið fyri stuttum. Hann var leysur í vinstru. Ein minutti undan steðginum økti Bogi Selfoss til 2-0, sum eisini gjørdist úrslitið. Uppspælið var í vinstra borði.

Uppflytaraliðini bæði – NSÍ og B36 – hittust við Løkin í Runavík. NSÍ var greitt oman á, men tað gekk striltið at fáa mál burturúr góðum møguleikum. Tíggju minuttir eftir steðgin eydnaðist tað at fáa málið, sum vísti seg at bera trý stig við sær. Sonni L. Petersen fór til baklinjuna í vinstru og legði flatt innfyri. Har gjørdist Búgvi Olsen leysur, og so var 1-0.

Skírisdag sær skráin soleiðis út: TB-SÍ, HB-LÍF, FSV04-ÍF, B36-B68 og KÍ-NSÍ.

**1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 2 SÍ | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 LÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 B68 | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 5 NSÍ | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 TB | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 7 FSV04 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 B36 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 KÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 10 HB | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 4 | -3 | 0 |

## 1. DEILD

**1. umfar, leygardagin 31. mars:**

B68-FSVágar04 2-1 (1-1)
0-1: Andrjey br 30.
1-1: Jósup Henriksen 45.
2-1: Dánial Hansen 68.
**Reytt kort:** Kári Hansen, B68, 88. (2 gul)

NSÍ-B36 1-0 (0-0)
1-0: Búgvi Olsen 58.

SÍ-KÍ 2-0 (2-0)
1-0: Jørgin Meitilberg 17.
2-0: Bogi Selfoss 44.

ÍF-HB 4-1 (2-0)
1-0: Nenad Saric 18.
2-0: Atli Petersen 34.
3-0: Bartal Eliasen 71.
4-0: Jan Ellingsgaard 77.
4-1: Bárður Mittelstein 83.
**Reytt kort:** Jarleivur Hansen, HB, 68.

LÍF-TB 2-1 (0-1)
0-1: Óli Johannesen 16.
1-1: Bárður á Lakjuni 60.
2-1: Arnhold Joensen 77.
**Reytt kort:** Magnus Skoralíð, LÍF, 33. (2 gul), Óli Johannesen, TB, 66. (2 gul), Adrian Joensen, LÍF, 90. (2 gul)

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Dánial Hansen | B68 | 1 |
| Jósup Henriksen | B68 | 1 |
| Andrjey | FSV04 | 1 |
| Bárður Mittelstein | HB | 1 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 1 |
| Jan Ellingsgaard | ÍF | 1 |
| Atli Petersen | ÍF | 1 |
| Nenad Saric | ÍF | 1 |
| Arnhold Joensen | LÍF | 1 |
| Bárður á Lakjuni | LÍF | 1 |
| Búgvi Olsen | NSÍ | 1 |
| Jørgin Meitilberg | SÍ | 1 |
| Bogi Selfoss | SÍ | 1 |
| Óli Johannesen | TB | 1 |